# Endiliga vann VB

*Hondbóltur: Fyri fyrstu ferð í ár eydnaðist tað VB at basa einum av ovaru støddu liðunum, og sigurin førdi helst við sær, at VÍF noyðist at siga farvæl til silvurvónir sínar*

JÁKUP MØRK

Alt kappingarárið á tamb hevur verið skrivað um, at úrtøkan hjá VB ikki hevur staðið mát við spælið á vøllinum.

Undan dystinum sunnudagin móti VÍF hevði tað nevnliga ongantíð eydnast VB at koppað nøkrum av ovaru støddu liðunum, tó at tær fleiri ferðir hava verið lutur í sera jøvnum dystum.

Tí vóru tað helst fleiri, sum høvdu roknað við, at VÍF skuldi fara avstað við báðum stigunum, tá tær sunnudagin vitjaðu í Vági, men tá avtornaði vórðu tá tær hjá VB, sum stóðu eftir við sigrinum.

**Ioana mansvard**

Fyrsta hálva tíman var tó lítið, sum bendi á, at stigini skuldu verða eftir í Vági, tí í so at siga allar 30 minuttirnar var tað VÍF, sum sýndi betra spælið.

Aloftast hevur tað verið soleiðis hjá VÍF, at um so at siga alt spælið hevur gingið ígjøgnum leikandi venjaran, Ioana Rápa, men soleiðis var kortini ikki sunnudagin.

Frá fyrsta bríkslið varð Ioana mansvard av Eyðbritt Krosslá, og hetta eydnaðist somikið væl, at leikandi venjarin so at siga einki fekk burtur úr.

Hóast Ioana í mangum dysti hevur verið Alfa og Omega hjá VÍF, so megnaðu hinar seks genturnar á vøllinum kortini at leggja eitt áhaldandi trýst á VB verjuna, sum so at siga ongantíð riggaði, sum hon skuldi fyrsta hálva tíman.

Tískil endaði fyrri hálvleikur við teirri heldur óvanligu støðu, at hóast Ioana bert hevði skotið tað eina málið, so var VÍF kortini á odda við tveimum, tá farið varð til hálvleiks.

**Verjan riggaði**

Í seinna hálvleiki gekst tó betur hjá teimum á heimaliðnum. Framhaldandi høvdu tær gott tak á Ioanu, og nú tóktist eisini at bera betur til hjá teimum, bæði í álops- og verjupartinum.

Nakrar væl eydnaðar flytingar vórðu framdar í verjuni, og í álopspartinum var største broytingin tann, at Regina Rádó brádliga vísti seg frá síni bestu síðu.

Fyrra hálvleik hevði hon annars langt ífrá prógvað, at hon eigur at teljast millum bestu leikararnar í landinum, men seinna hálva tíman fekk hon rættuliga vundið seg upp.

Rættuliga skjótt hevði VB eisini vunnið seg fram um vestmannagenturnar, og hóast munurin ikki gjørdist var serliga stórur, so var tað sum um, at VB nú hevði tamarhald á støðuni.

Tá so Sólrun Jacobsen eisini stóð ein frálíkan hálvleik í VB málinum, var lítið hjá VÍF at gera, og seinastu tíggju minuttirnar kundi VB rættuliga gera bart, soleiðis at talan at enda gjørdist um ein rættuliga tryggan sigur til heimaliðið.

**Glaðar um sigurin**

Úr Vági frættu vit eftir dystin, at frøin var stór um, at tað endiliga hevði eydnast teimum at koppa einum av ovaru liðunum. Tað tænir eisini VB kvinnunum til rós, at tær alla tíðina hava givið seg fult út í øllum dystunum, hóast teirra leiklutur í stríðnum um heiðursmerkini langt síðani er liðugt leiktur.

Hóast tær sjálvar ikki hava møguleikan at vinna nøkur heiðursmerki í ár, so fekk sigurin í hvussu so er tær avleiðingar, at silvurmerkini nú við 99,9% vissu fara til Neistan.

Harumframt merkti tapið fyri VÍF, at tær nú skulu kenna seg alt annað enn vísar í at heiðursmerki, tí nú er støðan brádliga tann, at Kyndil liggur best fyri í stríðnum um bronsumerkini.

Seinasti dysturin hjá Kyndli er móti júst VB, og úr Vági frætta vit, at tær í øllum førum hava ætlanir um at hevna finalutapið, so enn er vón fyri heiðursmerkjum í Vestmanna.

**VÍF uttan heiðursmerki?**

Endar VÍF uttan fyri heiðursmerkjaplássini man hetta helst verða eitt satt vónbrot fyri liðið, ið sum tað seinasta royndi at fylgja við Stjørnuni, tá Klaksvíksgenturnar høvdu runnið øll hini liðini av sær.

Góðu úrslitini hjá liðnum hava tó í rættuliga stóran mun verið tengd at leikandi venjaranum, Ioana Rápa. Tað sigur eisini eitt sindur um dygdir hennara, at hon hevur megnað at átikið sær henda leiklut, hóast hon meginpartin av árinum av røttum skuldi hildið seg uttan fyri síðulinjuna

Í grundspælinum fekk hon nevnliga ein álvarsligan skaða, tá VÍF vann á Stjørnuni, men kortini hevur hon hildið áfram at spælt. Fyri tveimum vikum síðani fekk hon so eisini ein snudd í fótin, og líkt er til, at hesin skaðin hevur darvað henni enn meira, tí teir báðar seinastu dystirnar hevur hon ikki í sama mun megnað at sett dám á VÍF liðið, og við fánaða spælinum frá venjaranum, eru vónirnar fyri heiðursmerkjum eisini følnaðar.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
VB: Regina Rádó 9 (4), Rannvá Augustinussen 6, Gurið Mortensen 4, Sólrun Krosslá 4, Arnleyð Krosslá 2, Eyðbritt Krosslá 1, Christina Holm 1
VÍF: Angelie Jógvansdóttir 4, Jacklin Durhuus 4, Signhild Petersen 3, Fríða Marjunardóttir 3 (1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Óluvá Poulsen 2, Ioana Rápa 2 (1), Eydna Johannesen 1, Randi Kúrberg 1
**Brotskøst:**
VB 5, VÍF 3
**Útvísingar:**
VB 1, VÍF 1
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Karsten Andersen og Geir Wardum



*Í seinna hálvleiki vísti Regina Rádó seg frá síni bestu síðu, og avrik hennara var ein av hornasteinunum undir sigrinum hjá VB og vestmannakvinnunum*

*Savnsmynd*

# Ein stórur sigur

*Hetta heldur liðskiparin hjá Mjølnir, Marjun Kalsø, sum er sera væl nøgd við, at flogbólturin nú aftur hevur eina steypafinalu*

JÁKUP MØRK

Tá vit í gjár fingu orðið á Marjuna Kalsø, sum uttan iva er ein av royndastu leikarunum her á landi, vóru longu lidnir knappir 24 tímar, síðani tær vóru vorðnar steypavinnarar, men frøin um sigurin hevði kortini ikki lagt seg.

**Ovurfegnar**

-Eg haldi ikki at vit nakrantíð í ár hava verið somikið fegnar um ein sigur, helt liðskiparin fyri.

Í sær sjálvum er helst einki at siga til, at frøin var stór, tí sjálvandi eiga leikarar at fegnast, tá tær hava vunnið greipuna, nú bæði lands- og steypakapping eru í flogbólti. Hinvegin hevur liðið hjá Mjølni verið somikið einaráðandi í vetur, at tað mest sum var væntandi, at tær skuldu vinna báðar kappingarnar.

Marjun heldur tó fyri, at alt tiltakið var somikið gott sett upp, at dysturin gjørdist nakað heilt serligt, og harumframt fingu tær ein alt annað enn léttan dyst móti Drátti, sum veruliga noyddu meistararnar at berjast fyri hvønn bólt.

**Harður dystur**

Um dystin sjálvan heldur Marjun, at hóast tær vunnu øll fýra settini, og harvið dystin 2-0, so var talan ongantíð um nakran léttan dyst.

- Í fyrra hálvleiki hekk spælið hjá okkum ikki nakað serliga væl saman, men tað eydnaðist okkum kortini at vinna bæði settini.

- Nú eg havi sæð dystin umaftur haldi eg sjálv, at vit í seinna hálvleiki fingu nógv betur gongd á. Serliga gjørdi tað góðan mun, at vit fangaðu nógvar bóltar niðri á gólvinum, umframt at miðálopið við Tinu og Sonju veruliga fekk gongd á, heldur veteranurin fyri.

Hon legði tó dent á, at hon sum so ikki vil taka nakran leikara fram um, tí talan er um eitt liðspæl, har tað er neyðugt hjá hvørjum einstøkum leikara at gera sítt. T.d. helt hon eisini, at tá blokkurin hjá Drátti riggaði somikið væl, var tað av alstórum týdningi, at smashsikringin hjá Mjølnir riggaði væl, soleiðis at bóltarnir, sum vórðu blokkaðir, vóru samlaðir upp aftur.

At enda legði Marjun afturat, at stóra frøin helst eisini komst av, at klaksvíksgenturin satt at siga vóru útlúgvaðar, tá dysturin endilig var liðugur.

- Vunnu vit ikki fjórða setti, eri eg bangin fyri at vit høvdu tapt dystin, men tað kann sjálvandi eisini vera, at vágagenturnar vóru eins troyttar og vit, men hesin spurningur verður so ongantíð svaraður, segði hon at enda.

**Betrar um hugin**

Um tiltakið sum heild heldur Marjun, at hetta sanniliga var góð reklama fyri flogbóltin.

Flogbóltssambandi hevði gjørt eitt megnar arbeiði fyri at skapa umtalu um dystin, og harumframt eigur SvF rós fyri teirra leiklut. Eitt arbeiðið, sum var sera professionelt gjørt, og hetta eiga teir rós uppiborið fyri, elt klaksvíksgentan.

Harumframt hevði tiltakið eftir hennara fatan ført við sær, at fleiri leikarar hjá teimum, sum í vetur hava tosað um at leggja ítróttina á hyllina nú hava fingið hug til at taka eitt tak afturat.

- Hetta var satt at siga ein ótrúlig uppliving, og allar vilja vit fegnar sleppa at eiga lut í einum slíkum sigri enn einaferð, og tískil verða vit helst betur mannaðar komandi vetur, enn líkt var til undan finaludystinum, greiður Marjun frá.

Um egna leiklut sín á liðnum sigur hon, at hon hevur hugsa eitt sindur um at gevast, men fyrst mugu tær hava ein avloysara kláran til plássið hjá henni, og so leingi sum hetta ikki er komið í heilt fasta legu, ætlar hon sær at halda áfram.

Hvussu hetta skal tulkast, er ilt at siga, men skal tað skiljast soleiðis, at hon ætlar sær at bíða, til hon verður spæld av liðnum, so kann tað merkja, at klaksvíksgenturnar fáa gleði av Marjuni í nakrar vetrar afturat.

At enda sigur hon læandi, at í hondbóltinum síggja vit jú, at Kári Mortensen framvegis heldur seg til í fremstu røð, so tað kann vera, at eisini Marjun Kalsø verður við í spælinum við létta hvíta bóltinum í nøkur ár afturat.



# - Eitt satt vónbrot

*Flogbóltur, menn: Klæmint Isaksen er sera vónbrotin av, at Fleyr ikki megnaði at vísa meir í steypafinaluni. – Vit eru sera vónbrotnir. Tað var uppiborið at Mjølnir vann, men vit góvu teimum ov lætt spæl*

SVEINUR TRÓNDARSON

- Dysturin var eitt stórt vónbrot frá okkara síðu. Vit spældu ikki nær í námind av tí, sum vit kunnu spæla. Tá Mjølnir samstundis spældi skilagott, var tað uppiborið, at teir vunnu dystin.

Tað er Klæmint Isaksen, sum spælir við Fleyr, sum, dagin eftir vónbrotið í steypakappingini, ger støðuna upp.

Hann er fult og heilt greiður yvir, at lið hansara millum mannað var mett sum favorittur, og hann viðgongur eisini, at teir høvdu væntað at vunnið. Tað er nú ikki so løgið, ti Fleyr hevði, undan dystinum leygardagin, ikki tapt ein einasta dyst í hesum kappingarárinum. Men soleiðis er tað nú einaferð við ítrótti.

- Tað er kanska eisini tað einasta positiva við dystinum leygardagin, nevnliga, at tað ikki frammanundan ber til, at siga hvør fer at vinna, hóast annað liðið er greiður favorittur undan dystinum, sigur Klæmint Isaksen.

**Ov einfalt spæl**

Klæmint Isaksen er sjálvsagt ikki nøgdur við, at Fleyr tapti finaluna leygardagin, men hann dugir kortini væl at síggja orsøkina til, at teir ikki vunnu.

- Spælið hjá okkum var ov einfalt. Vit fingu ikki ta breiddina í, sum vit plaga at hava, sigur Klæmint Isaksen.

Og tað er nakað um tað hann sigur. Sermerkið hjá Fleyr hetta kappingarárið hevur verið góðar móttøkur, men tær vóru ikki nóg góðar leygardagin. Við tí fækkaðust valmøguleikarnir hjá hevarunum, fyrst Jákup Williami og síðani Tummas Óla og samstundis gjørdist verjuspælið hjá Mjølnir léttari, og teir dugdu at gera sær dælt av hesum.

Klæmint viðgongur, at tað ikki gjørdist léttari av at Jan spældi libero leygardagin, tí hóast hann var framúr góður í verjuspælinum, so var hann saknaður í álopsspælinum.

**Ótilvitað undirmeting**

Tað var Fleyr, sum var favorittur leygardagin og tað smæðist Klæmint heldur ikki fyri at viðganga. Hann veit, at fólk flest høvdu roknað við, at teir fóru at vinna, av tí, at teir hava verið so langt frammanfyri hini liðini og tað hevur í síðsta enda, kanska verið við til at gera teimum ónáðir.

- Tað er ikki óhugsandi, at vit – ótilvitað – hava undirmett teir, og tað vórðu vit revsaðir fyri. Vit spældu ímóti teimum seinasta vikuskiftið og spældu vit upp til tað, sum vit kunnu spæla, so rokni eg við, at vit høvdu vunnið. Men nú vunnu teir, og tað var uppiborið, sigur Klæmint Isaksen.

Annars er Klæmint sera væl nøgdur við, at tað nú aftur finst ein steypakapping. Hann heldur, at tiltakið var sera væl sett saman, og at tað er gott fyri flogbóltin, at sjónvarpið sendi frá finalunum.

- Flogbóltssambandið eigur eitt stórt herðaklapp fyri tiltakið, sigur Klæmint Isaksen.

# - Vit eru nøgdar hóast alt

*Flogbóltur, kvinnur: Liðskiparin hjá Drátti, Elisabeth Rasmussen sigur, at sjálvandi eru tær vónbrotnar av at tapa, men tær høvdu ikki roknað við øðrum. – Vit gjørdu okkara besta, og tað eru vit nøgdar við, sigur hon*

SVEINUR TRÓNDARSON

Var Fleyr favorittur hjá monnum, so var Mjølnir tað ikki minni hjá kvinnum. Eins og Fleyr gjørdust tær meistarar fleiri umfør undan kappingarenda, og tí var ikki væntandi, at Dráttur fór at gera stórvegis um seg.

- Vit spældu móti Mjølnir seinasta vikuskiftið, og tá so ikki so gott út. Vit taptu nokkso ruddiliga, men hesaferð høvdu vit lovað at berjast enn meira fyri sakini og tað gjørdu vit so, um enn vit so ikki komu í gongd fyrr enn í seinna hálvleiki, sigur Elisabeth Rasmussen, liðskipari hjá Drátti.

**Næsta ár verður tað**

Hatta eru nú einaferð treytirnar tá umstøðurnar eru sum tær eru. Dráttur hevur ongan venjara havt í seinastuni – hann mátti leggja frá sær av ymsum ávum, og tað sást eisini leygardagin, at tað manglaði ein stýrandi persónur á beinkinum, sum kundi geva boð og vegleiðingar.

Um Dráttur fer at hava venjara næsta ár vita tær ikki enn, men tær vita, at tað hevði verið nógv betri um so var.

- Eitt annað, sum eisini spælir inn er, at vit hava fingið fleiri nýggjar leikarar inn á liðið í ár og tískil eru tær ikki spældar inn enn. Men kortini haldi eg, at tær, sum vóru á vøllinum komu rímiliga væl frá tí, sigur Elisabeth.

Annars heldur Elisabeth, at Dráttur spældi ein hampuligan dyst, sum gav áskoðarunum nakað fyri peningin.

- Tað var kanska ikki fyrr enn móti endanum, men fyri tað var talan um ein góðan dyst, sigur hon og vit kunnu ikki gera annað enn at geva henni rætt.

- Men tað var rættvíst, at Mjølnir vann dystin, sigur hon.

**Miðverjan gevur trupulleikar**

Trupulleikin hjá Drátti leygardagin var móttøkan og álopið, sum ikki var nóg avgerandi. Hetta er, sambært Elisabeth, ein trupulleiki, sum Dráttur hevur drigist við alt ár, tí tær hava ikki dugað nóg væl at avgera bóltarnar til sín fyrimun.

- Tað síggja vit eisini í finaluni. Vit sláa nógvar bóltar yvirum, men vit »drepa« ikki bóltarnar. Mjølnirleikararnir fáa teir uppaftur og tá tær leypa á, eru tær nógv meira avgjørdar, sigur Elisabth og peikar serliga á Margit Joensen og Tinu Jacobsen, sum tveir av Mjølnir leikarunum, sum Dráttur hevði trupulleikar av.

- Og so var tað servin frá Marjun. Hon sleppur at serva ov nógvar bóltar á rað uttan at vit gera stórvegis við teir og tað er ikki nóg gott.

Kortini er nakað at fara undir næsta kappingarár við.

Nú hava tær brúkt hetta ári til at læra hvønn annan betri at kenna og næsta ár ætla tær so at satsa eitt sindur meira.

- Men tað hevur verið ætlanin alla tíðina. Hetta árið skuldi brúkast til at fáa nýggjar leikarar innspældar og næsta ár fara vit at satsa meir, sigur hon.

Eins og hinir leikararnir er hon sera fegin um tiltakið í síni heild, og serliga fegin er hon um, at tað aftur varð spælt í høllini á Hálsi.

- Gólvið er, eftir mínari meting sera gott at spæla á, so hasum eigur Flogbóltssambandið at endurtaka næsta ár, sigur Elisabeth, sum eisini hóttir við at koma aftur at spæla finalu næsta ár.

# Endiliga eydnaðist tað

*Flogbóltur, menn: Trygvi Poulsen, liðskipari hjá Mjølnir, er ovurfegin um, at tað endiliga eydnaðist teimum, at vinna á Fleyr. – Dysturin bjargaði árinum, sigur hann*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað var góða lag á klaksvíkingum leygardagin og hava vit skilt tað rætt, so batnaði tað bara, sum kvøldið leið. Orsøkin var sjálvsagt tann, at fyrr um dagin vunnu bæði flogbóltsliðini hjá klaksvíkingum steypafinalurnar, so tað er einki at siga til, at lagið var gott. At menninir vunnu var enntá púra óvæntað, hóast teir sjálvirhøvdu vónað tað

- Aftaná dystin seinasta vikuskiftið hildu vit, at vit høvdu ein møguleika og vit hava arbeitt málrættað fyri at vera so væl fyri, sum yvirhøvur tilber. Vit høvdu vónað at vunnið, men vit høvdu kanska ikki væntað tað kortini, so tað sigur seg sjálvt, at vit eru fegnir um úrslitið, sigur Trygvi Poulsen.

**Uppiborið**

Tá vit biða Trygva taka saman um dystin sigur hann, at hann heldur, at tað var uppiborið at Mjølnir vann.

- Vit vunnu bara tað eina settið, men vit spældu sera væl í teimum báðum avgerandi javnbrótarunum og tí haldi eg, at tað var uppiborið. Fleyr fekk ongantíð fótin fyri seg, sigur Trygvi.

Hann sigur at høvuðsorsøkin til, at Mjølnir vann var, at liðið hesaferð hevði ta neyðugu breiddina.

-Umframt Borko, sum slóg meginpartin av bóltunum í fyrra hálvleiki, so vóru serliga John, Jóannes og Hjalti sera væl við. Tað gjørdi, at Bogi hevði fleiri møguleikar í at velja, og tí gekk tað so væl, sum tað gjørdi, sigur Trygvi.

Hann leggur afturat, at eftir teirra meting spældi John sín besta dyst á árinum, leygardagin.

**Tann øvugta verð**

Hinar dystirnar í ár, sum hesi bæði liðini hava spælt, hevur tað verið so, at Fleyr hevur verið omaná í øllum, men hesaferð fingu teir ongantíð fótin fyri seg.

- Eg veit ikki, um nervarnir spældu teimum eitt puss, men tað er møguligt. Okkara spæl gjørdi teimum tað ikki léttari og tað er eitt beinleiðis úrslit av venjingunum upp til finaluna. Venjarin hevur tosað nógv um skarpar servur og tað vísti Hjalti m. a. at hann hevur fangað. Hann hevði eina røð av sera góðum servum, og m. a. hevði við sær, at tað hesaferð var Fleyr, sum skuldi hálsa aftaná okkum, sigur Trygvi.

Hóast leikararnir á Mjølnir liðnum ikki eru so gamlir í garði, so merkti Trygvi ikki nervar á teimum leygardagin. Teir vóru uppsettir upp á at vinna og vóru í so máta líkaglaðir við at dysturin var sjónvarpaður.

- Og tað er eisini tann øvugta verð, tí fyri mær sá tað út til, at tað vóru teir, sum høvdu flestu nervarnar at dragast við, sigur Trygvi, sum saman við hinum leikarunum fyrst ferð at hava ein steðg, og síðani fer undir at fyrireika seg til næsta kappingarár.

Um tað verður við Borko Ilic sum venjara, er ilt at siga, men hann hevur í øllum førum givið sær sjálvum eina framúrskarandi góða samráðingarstøðu, um tað er tað hann ynskir.


# STEYP OG HEIÐURSTEKIN

Vit hava Føroya største úrval av steypum og heiðursteknum.



**Vit gravera (næstan) alt:**

- El-talvur
- Skipstalvur
- Búmerkir
- Navnaskeltir
- Termokannur
- Pennar o.a.

3arin
UR GULL SILVUR
FOTO & VIDEO
FLØGUR

SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR · TEL 355 355